# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Eg var í øllum førum mest elskaði »klaksvíkingur« í HB hendan dagin*

*Paul Clapson*



*Stóra súkklukappingin verður ikki at síggja í Klaksvík í ár. Fyrireikararnir hava nevnliga gjørt av at strika prologin í kappingini*

# Eingin prologur í Statoil-kappingini

**Klaksvík sleppur ikki upp í part, tá Statoil Kring Føroyar fer av bakkastokki 17. juli í ár**

SÚKKLING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyrireikararnir handan Statoil Kring Føroyar-kappingina hava boðað frá, at kappingin í ár byrjar tann 17. juli

Í innbjóðingini til kappingina verður sagt, at í mun til undanfarin ár verður eingin prologor súkklaður. Hesin hevur annars verið fastur partur av kappingini, og er hetta gjørt við einkultstarti í Klaksvík.

Í ár verður kappingin soleiðis skipað við landavegskoyring í Eysturoynni (100 km), tíðarkoyrin á Sandoynni (27 km), landavegskoyrin í Suðuroy (100 km) og at enda við tíðar- og býarkoyring í Havn.

# Skálkur er klædnastuðul hjá fótbóltinum

**Fótbóltssamband Føroya hevur undirskrivað nýggja samstarvsavtalu við klædnafyritøkuna p/f Skálkur**

FÓTBÓLTUR
*Tíðindaskriv*



*Høgni í Stórustovu, FSF-forseti, og Lars Müller, stjóri í Skálki, skrivaðu undir nýggju klædnaavtaluna*

Við avtaluni er Skálkur vorðin veitari av klædningum til starvsfólk hjá fótbóltssambandinum, landsliðsvenjarar og hjálparfólk hjá teimum 8 landsliðunum undir FSF. Skálkur er samstundis eisini vorðin veitari av klædningum til allar dómararnar undir Føroya Dómarafelag.

Avtalan varð undirskrivað av Høgna í Stórustovu, FSF-forseta, og Lars Müller, stjóra í p/f Skálki.

Seks handlar eru undir p/f Skálki. Handlarnir, sum allir eru heimahoyrandi í SMS, eru Skálkur, Klædnakøni (Tøjeksperten), Gellan, Exit, Jack & Jones, Sportmaster.

## DBU góðkent felagið hjá Toda

**Danska fótbóltssambandið hevur nú góðkent samanleggingina av feløgunum á Amager, og nýggja felagið kann frá 1. Juli spæla undir navninum FC Amager**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fremad Amager, Kastrup Boldklub, Dragør Boldklub og Kløvermarken FB hava lagt saman í eitt felag. Ætlanin er, at hetta felag skal fáa navnið FC Amager.

Tað er tó upp til danska fótbóltssambandið at góðkenna eina slíka samanlegging, og tað hevur DBU nú gjørt.

FC Amager skal taka plássið hjá Fremad Amager í donsku fótbóltskappingini, og sjálvt navnið, FC Amager, verður eisini viðurkent sum navnið á nýggja felagnum hjá Toda Jónssyni og hinum.

## 900 milliónir er ov lítið

Hóast Real Madrid støðugt sigst hava áhuga í at keypa Cristiano Ronaldo úr Manchester United, so eru boðini frá enska oddaliðnum púrasta greið.

- Vit vilja ikki selja. Heldur ikki fyri 900 milliónir. Teir kunnu bjóða allar pengar í heiminum, men tað er eingin upphædd, sum er nóg stór til at keypa hann leysan av sáttmálanum við Manchester United, sigur hjálparvenjarin í Manchester United, Carlos Queiroz, við spanska Marca.

Ronaldo hevur sýnt stórspæl alt kappingarárið, og higar til er hann toppskjútti í bæði Premier League og Champions League.

-mørk